# – Nú kenni eg mínar grensur



*Teir kunnu tað sama venja seg við hetta lívið – at rógva í Skotlandi og tvørtur um Atlantshavið er hvør sítt. Livar Nysted situr fremstur*



**38 ára gamli Livar Nysted úr Hvannasundi fer um ársskiftið at skriva seg í føroysku søgubøkurnar sum tann fyrsti føroyingurin, ið hevur róð tvørtur um Atlantshavið. - Hetta var tað harðasta sum eg nakrantíð havi roynt, sigur Livar, sum júst er afturkomin av venjingarlegu í Skotlandi**

RÓGVING

*Fróði Waag*

**Hvannasund:** Nú er nakað liðið, síðani tíðindi spurdust um, at Livar Nysted úr Hvannasundi ætlaði vinna á Atlantshavinum.

Síðani Livar gjørdist partur av manningini á bátinum »La Mondiale«, hevur hann vant eftir miðvísari ætlan. Í síðstu viku varð hann fyri triðju ferð saman við manningini og vandi í Skotlandi.

Tað er ikki bara sum at siga tað at kalla manningina saman til venjing, tí teir koma víða frá.

- Tað ljóðar kanska ikki av so nógvum, at vit bara hava vant tríggjar ferðir saman. Men til eina tílíka avbjóðing hevur sinnalagið nógv meiri at siga, enn júst kropsligi formurin. Og tað er júst sinnalagið vit royna at finna.

- Um eg ikki frammanundan visti hvar mínar grensur vóru, so veit eg tað í øllum førum nú, sigur Livar, tá vit hittu hann til ein kaffimunn.

Livar bjóðar innar í stovuna. Tað er týðiligt at síggja, at hann er ikki so væl gongdur henda dagin. Okkurt man hann hava verið ígjøgnum síðstu vikuna!

## SAS-venjarar

Tað var við spenningi, at Livar fór heimanífrá á hesa ferðina. Spurdur um, hvat hann væntaði sær av túrinum, tá ið hann fór heiman frá, svarar Livar soleiðis:

- Eg veit ikki akkurát hvat eg væntaði mær, men vit fingu í øllum førum at vita, at fólk frá SAS (Special Air Service) skuldu taka sær av venjingini.

- Hetta fekk meg at hugsa, at tað nokk fór at verða í harðara lagi. Og so varð eisini!, flennir Livar.

Teir vóru longu á fótum klokkan sjey um morgunin. Eftir 1½ tíma við kropsligum venjingum, skuldu teir rógva í kajakk. Fyri tann ókenda ljóðar tað kanska ikki so strævið, men tað var vátt og kalt, og teir fingu ongantíð at vita, hvussu leingi venjingarnar fóru at taka.

- Knappliga skuldu vit ikki rógva meir, tí nú skuldu vit, fýra mans, úr kajakkini, og saman klintra upp eftir einum sjey metra høgum pela. Á toppinum var ein flata sum ein pizzadós. Her skuldu vit standa, til nærri boð vóru givin. Og allir skuldu standa saman. Kanska ein ómøgulig uppgáva, men við eitt sindur at teamwork bar tað til, so løgið tað ljóðar.